**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**
*Administration of Occupational Safety and Health*
Falkavegur 6 ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands
Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo

*Skrásetingar nr.:*
**L-C002-1**

# Leiðbeining um løðing av akkumulatorum

***Løðirúm.***

Undir løðing av akkumulatorum vil spreingiligt gass s.s. súrevni og vatevni (ilt og brint) taka seg upp og vil eisini svávulsýruevni verða í luftini.
Øll løðing skal tí fara fram undir munadyggari ventilatión av rúmunum, har battaríini eru støðaði.
Til ventilatión av rúmum, innrættað sum løðistøð til akkumulatorar, kann hesin vegleiðandi formul brúkast:

$q_v = 1{,}4 \times 10^{-5} \times I \times n$ ($m^3/s$), har

$q_v$ er neyðug luftmongd í $m^3/s$
$I$ er løðistreymurin í amp.
$n$ er talið av sellum í akkumulatorinum.

Ventileraða luftin skal førast út í fría luft og endurnýggjast við frískari luft, sum skal verða tikin inn í rúmið við gólvið. Endurvinning af hita frá útblásingarluftini er ikki loyvd.
Við løðiplássið, ella við inngongdina til løðirúmið skal skelti standi, sum setur forboð fyri at roykja og nýta opnan eld. Her skal eisini verða atgongd til rennandi vatn.

***Løðitólið.***

Yviruppløðing skal ikki kunna lata seg gera, og tólið skal verða spenningsleyst undir til- og frákobling.
Ventilatiónsútgerðin skal verða soleiðis tilgjørd, at henda altíð koyrir, tá løðitólið er sett til.

***Persónlig vernd.***

Undir handfaring av akkumulatorum og undir áfylling av sýru, skal viðkomandi brúka egnaðar verndarbrillur ella andlitsskerm og um neyðugt fyriklæði.

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ,** 26. september 1990.
Eli Davidsen, stjóri (sign.)

***Lógarheimild:***
Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.

| *Útgivið fyrstu ferð:* | *Seinastu broytingar:* |
|---|---|
| **2. august 1984** | **26. september 1990** |